FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 22. august 2022
J. nr. 22/14877
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-009/22 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um asfaltering í Fugloynni

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir eru um at asfaltera vegin millum Hattarvík og Kirkju?
2. Hvørjar ætlanir eru um at gera nýggja bilverju á vegnum millum Hattarvík og Kirkju?
3. Hvørjar ætlanir eru um at bøta um lendingina í Hattarvík og á Kirkju?

Svar til spurning 1 og 2
Vegurin millum Hattarvík og Kirkju var bygdur í tíðarskeiðinum 1975-1983, og var asfalteraður við oljugrúsi eitt sindur seinri. Vegurin er 5 km til longdar, og er einbreytaður við nøkrum møtiplássum.

Tað kostar umleið 15 mió kr. í dagsins prísum at asfaltera vegin. Sjálv vegabreytin er sum heild í hampiligum standi, og verður asfaltering tí ikki raðfest.

Rulluportrini eru vánalig, og skulu øll gerast í stand. Bilverjan fram við vegnum er sera illa farin, og má øll bilverjan skiftast út.

Neyðugt er at raðfesta hesi arbeiði fremri.

Svar til spurning 3
Ábøtur vóru gjørdar á lendingina á Kirkju í 2021, soleiðis at atløguviðurskiftini blivu betri.

Um játtan verður tøk til endamálið, kann verða farið undir at betra lendingina í Hattarvík. Í fyrsta umfari má lendið omanfyri lendingina verða tryggjað, soleiðis at tað ikki ríður oman.

Tinganes, 22. august 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum